

www.oljan.fo

**Jan Müller** 14 - 11 - 2011

# Johan Dahl - Oljan er í tryggum hondum

Oljumálaráðharrin í Føroyum fer komandi fýra árini at eita tað sama sum undanfarnu árini, nevniliga Johan Dahl. Hann varð tann einasti av landsstýrisfólkunum frá undanfarnu samgongu við undantaki av sjálvum løgmanni, Kaj Leo Johannesen, sum varðveitti sín landsstýrissess. Johan Dahl sigur við oljan.fo, at hann er sera fegin um, at løgmaður og flokkurin hava víst honum hetta álitið og fer hann at gera sítt ítarsta at liva upp til tað. "Hóast einki verður nevnt í samgonguskjalinum um oljuna, so kenni eg meg sannførdan um, at oljan er í góðum hondum hjá hesum landsstýrinum. Nú hyggja vit frameftir og seta okkara vón til, at Statoil, ExxonMobil og Atlantic Petroleum fara at koma fram á antin olju ella gass í komandi boringini. (Oljan.fo hevur prát við Johan Dahl og eisini løgmann um komandi oljuframtíðina seinni, red.) Mynd - Kaj Leo Johannesen, løgmaður hevur júst handað komandi oljumálaráðharranum, Johan Dahl, blómur. Og hann sigur uttan at blunka, at oljan er í góðum og tryggum hondum. Mynd oljan.fo/Jan Müller